# Uppritið almannakunngjørt

Ein spurningur, ið stingur seg upp í hesum sambandi, er hvussu dómsvaldið skal skipast.

Skotið verður upp, at meðan rættarskipanarnevndin undir grundlógarnevndini ger uppskot til føroyska rættarskipan, heldur skipanin við dómsvaldinum fram, sum hon er nú.

Verður hetta loysnin verður neyðugt at gera semjur við dómstólsstýrið um, at teir dómarar, ið hava innlit í føroysk viðurskifti, og sum í dag døma í Føroya Rætti, Eystara Landsrætti og Hægstarætti í føroyskum málum, halda fram at døma eftir at rættarskipanin er komin undir føroyskt fyrisitingar- og løggávuvald.

Ein tílík loysn eigur eisini at gerast fyri føroysku ákæruvaldsskipanina.

6 c) Fíggjareftirlit og innsetaratrygdarskipan

Galdandi skipan viðvíkjandi fíggjareftirliti

Danska fíggjareftirlitið hevur eftirlit við, at føroysku peningastovnarnir halda seg innan banka- og sparikassalógina. Danska fíggjareftirlitið hevur eftirlit við øllum tí danska fíggjarsektorinum, men í Føroyum eru tað bert peningastovnarnir, ið eru undir eftirliti av danska fíggjareftirlitinum. Føroyingar hava t.d. sítt egna tryggingareftirlit.

Fyri at styrkja álitið á bankaskipanina og at skapa ein so tryggan fíggjarmarknað tvørtur um landamørk sum gjørligt, hava bæði ES-lond og lond við tilknýti til ES seinastu 15-20 árini samtykt hóp av lógum við tí í hyggju at gera felagsreglur fyri fíggjarstovnar, og at styrkja um eftirlitið við hesum stovnum. Danska fíggjareftirlitið hevur umsjón við at ásetingar í lógum og kunngerðum verða hildnar, eins og danska fíggjareftirlitið hevur havt til uppgávu at gera ein part av teimum neyðugu kunngerðunum á økinum.

Peningastovnarnir skulu leypandi útvega Fíggjareftirlitinum ymiskar upplýsningar um virksemi sítt. Talan er um mánaðarligar, kvartalsvísar og hálvárligar upplýsingar.

Tað eru í høvuðsheitinum peningastovnarnir sjálvir, ið rinda fyri fíggjareftirlitið — hetta er ásett í banka- og sparikassalógini. Gjaldið verður ásett eftir skuld og ábyrgd. Tað eftirlit, sum Fíggjareftirlitið hevur av øðrum virkjum, ið ikki eru peningastovnar, verður somuleiðis goldið av virkjunum.

Nýggj skipan viðvíkjandi fíggjareftirliti

Undir teirri nýggju skipanini verður landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ovasti fyrisitingarligi myndugleiki á økinum. Føroyskt fíggjareftirlit tekur við ábyrgdini av teimum uppgávum, sum danska fíggjareftirlitið higartil hevur røkt í Føroyum. Í sáttmálanum verður miðað eftir, at samstarv verður millum føroyskt fíggjareftirlit og danska fíggjareftirlitið.

Galdandi skipan viðvíkjandi innsetaratrygdarskipan

Endamálið við lógini um innsetaratrygdargrunnin er at avmarka missin hjá privatum innsetarum, ið hava pening á konto í peningastovni, sum fer á húsagang.

Missurin verður avmarkaður á tann hátt, at hesir innsetarar fáa endurgoldnar upp til 300.000 kr.

Danski búskaparmálaráðharrin er ovasti fyrisitingarligi myndugleiki á økinum, og danska fíggjareftirlitið umsitur grunnin.

Talan er um eina tryggingarskipan, sum peningarstovnarnir eftir stødd bera kostnaðin av.

Nýggj skipan viðvíkjandi innsetaratrygdarskipan

Miðað verður eftir at sáttmálin skal tryggja, at føroysku peningastovnarnir framhaldandi kunnu vera við í hesi tryggingarskipan.

6 d) Heilsuøkið

Galdandi skipan víðvíkjandi heilsuøkinum

Heilsuøkið er yvirtikið sambært grein 9 í heimastýrislógini, tó soleiðis at stórir partar av løggávuni enn eru ríkisløggáva, og partar verða eisini enn umsitnir av donskum myndugleikum. Rammulógir vórðu tó samtyktar í 1995 við tí endamáli at flyta meginpartin av ábyrgdini til Føroya.

Í 1995 varð valt at *góðkenningarløggávan* (autorisatiónsløggávan) (290-312)[3] ikki skuldi vera fevnd av rammulógunum, tí at mett varð ikki, at føroyskir myndugleikar høvdu neyðuga førleikan og orkuna at løggeva á økinum, og umsita tað. Almanna- og heilsmumálastýrið metir heldur ikki, at orsøk er til at royna at fáa sær henda førleika, tí økið er so neyvt reglusett í altjóða og EBS reglum, sum eisini vit eiga at fylgja, líka mikið hvør rættarstøðan er.

Verandi skipan á økinum er alt annað enn nøktandi: góðkennningarløggávan, sum er í Føroyum, er í meðal eini 10 ár eldri enn samsvarandi danska løggávan, og á onkrum økjum er als ongin løggáva galdandi í Føroyum. Økið verður í verki umsitið, sum um galdandi donsk løggáva var í gildi her, bæði har gomul løggáva er, og har ongin løggáva er.

Tann parturin av *eftirlitinum við heilsuverksstovnum og — myndugleikum*, sum er í Føroyum, verður framdur av landslæknanum (288ff & 355f), sum er ein danskur stovnur undir *Sundhedsstyrelsen*, ið annars fyrisitur hesar uppgávur.

Ymsir møguleikar eru hjá hinum einstaka at *kæra til danskar myndugleikar* um elvdar skaðar, ella annað, sum hin einstaki metir sum skeiva viðgerð í heilsuverkinum. Talan er um endurgjald fyri koppsetingarskaðar (274) og sjúklingatrygging (292).

Eisini *á øðrum økjum er enn donsk løggáva*. Talan er t.d um økini vevnaðartøka, fosturtøka, fyribyrgjandi heilsukanningar í sambandi við barnsburð, ókeypis koppseting, fráboðan um føðingar og andlát, sterilisatión og gelding og líkskoðan. Hesi øki kunnu tó uttan stórvegis krøv ella trupulleikar verða umsitin av føroysku myndugleikunum.

*Apoteksverkið* varð (helst í stríð við heimastýrislógina) yvirtikið sum føroyskt sermál í 1949, og økið virkar væl. Fleiri avtalur eru við danskar stovnar um at nýta teirra servitan, kunning o.t., sí niðanfyri.

Nýggj skipan viðvíkjandi heilsuøkinum

Almanna- og heilsumálastýrið mælir til ikki at fremja sjálvstøðuga regluseting á góðkenningarøkinum, men tó so at løggávuheimildin verður her. Hetta er gjørt undir verandi skipan viðvíkjandi góðkenning av bilum, har føroyska lógin ásetir, at danskar reglur og standardir á nærri tilskilaðum øki galda í Føroyum.

At avgreiða einstøku málini verður tá ein (lutfalsliga lítil) eyka arbeiðsbyrða hjá viðkomandi donsku fyrisiting, meðan reglusetingin sjálv í grundreglini ikki verður at krevja nakað eyka í Danmark, og í Føroyum fer minni orka at skula til enn hon, sum í dag *átti at verið nýtt* til at umsitið økið nøktandi — tó kortini kanska ikki minni, enn tann orka sum verður nýtt.

Starvsøkini, talan verður um, eru hesi:

- Læknar
- Tannlæknar
- Kliniskir tannsmiðir
- Sjúkrasystrar
- Ljósmøður
- Yrkis- og alisrøktarar (ergo- og fysioterapeuter)
- Fótrøktarar
- Kliniskir kostráðgevar
- Tannrøktarar
- Sálarfrøðingar (ongin góðkenningarlóg er á økinum í dag)
- Kiropraktorar (ongin góðkenningarlóg er á økinum í dag)
- Optikarar (ongin góðkenningarlóg er á økinum í dag)

Herafturat koma heilsustovnar o.t.

*Landslæknaembætinum* viðvíkjandi verður neyðugt at gera semjur í tann mun embætið — sum nú - skal hava eftirlit við virkseminum hjá góðkendum heilsuverksstarvsfólki o.t. Tað verður helst minni munurin, um embætið verður føroyskt ella danskt.

Í mun til verandi støðu verður v. ø. o. talan um eina gjøgnumførda, ómakaleysa dagføring av løggávuni, samstundis sum rættarstøðan verður betur: løggáva verður á øllum økjum, har londini kring okkum meta at løggáva krevst, og mótsatt í dag verður umsitið eftir teirri løggávu, sum á pappírinum er galdandi her.

Skipanin kemur at bera í sær, at Føroyar ikki reelt ávirka økið politiskt. Soleiðis er støðan eisini undir verandi skipan, og sum er, hava vit kortini ikki neyðuga fakliga førleikan at ávirka økið. Onki er til hindurs fyri, at vit (í funktionelt samanhangandi pørtum) taka øki undir beinleiðis føroyska fyrisiting, tá ið nøktandi førleiki er í landinum, og um hetta verður eitt politiskt ynski (sí tó niðanfyri).

Afturat omanfyri nevnda kann verða lagt, at gongdin innan EBS (fyri sovítt allan vesturheimin) er móti støðugt meira samansjóðan av regluverki og góðkenningarmannagongdum á økinum. Hetta ber í sær, at alt færri forðingar fara at standast av, at tað eru júst *danskar* góðkenningar, vit nýta: tær fara sum frá líður at verða tær somu allastaðni, og hervið verða helst einans eftirlitsuppgávurnar at liggja eftir í einstøku londunum.

Viðvíkjandi *kærum* er talan er um øki, sum kunnu krevja stóra servitan, og ógvuliga langt er ímillum kærurnar (færri enn 10 um árið). Tí er helst tryggari, um økið, ið hvussu so er fyri ein part, verður umsitið av útlendskum myndugleika. Tí verður semja eisini gjørd á hesum øki.

Viðvíkjandi *vísindasiðsemisnevndarskipanini* verður eisini tørvur á samstarvi.

Viðvíkjandi *donsku løggávuni annars* er ikki neyðugt við aðrari skipan, enn at fyrisitingin fær rímiligt skotbrá (eini tvey ár skuldu verið á góðari leið) at taka økini til sín.

Viðvíkjandi *apoteksverkinum* verður neyðugt at hava semjur við *Sundhedsstyrelsen*, *Statens Serumlaboratorium* og *Statens Veterinære Institut for Virusforskning* um krøv til medisinskan útbúnað, og um skráir yvir góðkendan heilivág o.t.

Neyðugt verður somuleiðis at halda fram við formaliseraða samstarvinum við *Amternes Lægemiddelregistreringskontor (ALIS)* um forskriftir fyri heilivágsgerð.

Økið er væl skipað við semjum sum er. Tí er nóg mikið at tryggja, at verandi semjur halda fram.

6 e) Almannaøkið

Galdandi skipan viðvíkjandi almannaøkinum

Almannaøkið er í grundregluni "liðugt" yvirtikið eftir grein 9 í heimastýrislógini, men á tveimum smærri, avmarkaðum økjum er samstarv:

Flestar *kærur viðvíkjandi fyritíðarpensjónsavgerðum og á vanlukkutryggingarøkinum* fara í dag til *Den Sociale Ankestyrelse*, og verða viðgjørdar saman við donsku kærunum. — Men *Ankestyrelsen* sigur seg — vegna væntandi innlit í føroysk viðurskifti— gera lítið av at eftirmeta meira sosialt treytaðu partarnar av metingini, sum liggur til grund fyri *føroysku* avgerðunum. Bert eini 5% av kærarunum fáa viðhald, tað eru færri enn í Danmark.

*Konventiónin um sosiala trygd* regulerar og lættir um atgongdina hjá arbeiðstakara til almennar trygdarveitingar í hinum londunum, og ásetir, at fólk í vinnu vinna sær rættindi til eftirløn úr londunum í sama lutfalli, sum áramálið, tey hava arbeitt í viðkomandi landi.

Sáttmálin er tungur at umsita, og krevur dagførda servitan. Semja er gjørd við *Sikringsstyrelsen* um serfrøðingahjálp — viðvíkjandi ítøkiligum ivamálum, og við upplæring - í sambandi við umsiting samsvarandi sáttmálanum. Vegleiðing verður eisini fingin úr hinum norðurlondunum.

Nýggj skipan viðvíkjandi almannaøkinum

Tað er ynskiligt, um vit í einum skiftisskeiði (nøkur ár) kunnu fáa *kærur viðvíkjandi avlamispensjónsumsóknum* viðgjørdar í *Den Sociale Ankestyrelse*. Somuleiðis verður neyðugt at fáa serfrøðingahjálp o. a. á *vanlukkutryggingarøkinum*.

Á *konventiónsøkinum* (Nordisk konvention om sosial sikring) fer helst altíð at verða tørvur á hjálp viðvíkjandi ymiskligum ivamálum úr øðrum londum, og Almanna og heilsumálastýrið metir, at neyðugt er at gera semju um serfrøðingahjálp á hesum økinum.

6 f) Flogferðsla

Galdandi skipan viðvíkjandi flogferðslu

Flogferðsla verður skipað sambært teimum treytum, sum loftferðslustovnur Sameindu tjóða, ICAO setir, eins og eftir fleirtjóða sáttmálum, ES-reglum og loftferðslulógini, sum aftur lýkur tær treytir, sum tvítjóða og fleirtjóða felagsskapir seta flogferðsluni.

Løggávan, sum er lýst at galda í Føroyum á flogferðsluøkinum, er donsk, tó við ymiskum broytingum, sum heimastýrið hevur ásett.

Eftir seinna veraldarbardaga gjørdist Vága Floghavn føroysk, tá bretar avhendaðu floghavnina til Føroya Løgting. Í 1963 varð semja gjørd millum landsstýrið og *Statens Luftfarts Væsen*, eftir hetta nevnt SLV, sum m.a. ásetti, at SLV ókeypis skuldi ráða yvir lendinum og útbúnaðinum og reka floghavnina.

Danir hava víst á møguleikan fyri, at føroyingar yvirtaka raksturin av Vága Floghavn.

Hjá *Statens Luftfartsvæsen* í Vágunum starvast 32 fólk. Flogvøllurin hevur í miðal havt eitt árligt undirskot uppá 13.8 mió. kr. (1994 -1998).

Flogvøllurin í Vágunum, sum SLV rekur, rindar umleið 2,9 mió. kr. um árið yvir rakstrurin fyri allar tænastur, sum Loftferðslueftirlitið og Flogtrygdartænastan hjá SLV veita á føroyskum øki. Loftrúmið - flogferðsluna sum fer um føroyskt loftrúm - umsitur Ísland, Danmarkar vegna.

Flogfeløgini rinda sjálvi fyri at útbúgva og góðkenna starvsfólkini.

Nýggj skipan viðvíkjandi flogferðslu

Løggávuvald og fyrisitingarvald gerast føroysk og fullveldi yvir loftrúminum gerst føroyskt.

Viðvíkjandi løggávuni verður mælt til, at fylgja donsku rættarreglunum á økinum við teim tillagingum, sum Føroyar hava fyri neyðini.

Ísland umsitur sum er føroyska loftrúmið Danmarkar vegna. Mælt verður til, at Ísland í fyrsta umfari umsitur loftrúmið Føroya vegna.

Viðvíkjandi rakstri av floghavnini, má tað vera ein treyt, at trygdin og dygdin er í lagi, tá ið føroysku myndugleikarnir fáa ræði á økinum.

Skaðanevndin, ella (*Havarikommissionen for civil luftfart*) kannar tilburðir viðvíkjandi flogóhappum. Mælt verður til, at gera semju við skaðanevndina soleiðis, at útgreiningar fáast til vega um eitt føroyskt skrásett flogfar skuldi verið fyri óhappi.

Viðvíkjandi flogferðsluøkinum annars verður víst á, at økið er altjóða reglusett og krevur at Føroyar gerast partur av fleiri sáttmálum, umframt teimum, Føroyar í dag eru partur av. Føroyar eiga sostatt at taka undir við Chicagosáttmálanum og gerast sjálvstøðugur limur í ICAO. Landsstýrið sigur donsku ríkisstjórnini frá hesum, og ger semju um at teir ráðgeva landsstýrinum um hvussu limaskapurin verður røktur á bestan hátt.

6 g) Skipaeftirlit

Galdandi skipan viðvíkjandi skipaeftirliti

Málsøkið skipaeftirlit fevnir í høvuðsheitum um teknisk krøv og fyriskipanir viðvíkjandi tryggleika á føroyskum skipum.

Eftirlitið við føroyskum skipum verður tekniskt og fyrisitingingarliga gjørt av *Søfartsstyrelsen* í Danmark, sum fremur hetta m.a. við eini økisskrivstovu í Tórshavn, har tríggir eftirlitsmenn og tvey hálvtíðar skrivstovufólk starvast. Øll teknisk og fyrisitingarlig servitan verður annars fingin til vega úr *Søfartsstyrelsen*.

Alt lógarsmíð, tekniskar fyriskipanir og vegleiðingar verða gjørdar av *Søfartsstyrelsen*. Danmark hevur lagt upp fyri serstøkum føroyskum viðurskiftum, serstakliga fyri fiskiskip. Føroyskir sjóvinnumyndugleikar samstarva í tekniskum nevndum og á útbúgvingarøkinum.

Ein nevnd arbeiður í løtuni við at skriva álit um yvirtøku av skipaeftirlitinum og hvussu eitt føroyskt skipaeftirlit í framtíðini eigur at skipast.

Nýggj skipan viðvíkjandi skipaeftirliti

Nýggja skipanin ber við sær, at Føroyar hava fulla ábyrgd av málsøkinum skipaeftirlit t.e. løggávuvald, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd, og taka við øllum millumtjóða rættindum og skyldum innan málsøkið t. e. at Føroyar gerast sjálvstøðugir limir í IMO og ILO og annars samstarva á øllum økjum, har hetta verður mett neyðugt og fíggjarliga og á annan hátt er gjørligt.

Mett verður, at eitt føroyskt skipaeftirlit kann skipast sum ein lutfalsliga lítil fyrisiting, sum verður løgd saman við Sjóvinnufyrisitingingi.

Uppgávur viðvíkjandi skipaeftirliti kunnu verða *útlisiteraðar* í størsta mun t.d. til góðkend klassafeløg.

Skipaeftirlitið kemur at hava almennar myndugleikauppgávur, lógarsmíð og eftirlitsuppgávur.

Neyðugt verður at gera semju um samstarv og fakligan stuðul frá *Søfartsstyrelsen* til vanligt skipaeftirlit í eini skiftistíð.

Viðmerkingar til meginreglu 7

Javnstøða í tjóðskapi

Galdandi skipan viðvíkjandi rættindum og skyldum føroyinga og dana hvør hjá øðrum

a) Felags heimarættur

Treytirnar fyri at fáa danskan heimarætt eru ásettar í lovbekendtgørelse nr. 155 af 06.04. 1978 af L. om dansk indfødsret, som senest ændret ved L. nr. 159 af 18.03.1991.

Málsøkið heimarættur er ikki umrøtt í heimastýrislógini og kemur tí undir grein 6 í somu lóg, sum mál, ið verða umsitin sum ríkisins felagsmál av ríkisvaldinum.

Sambært galdandi skipan hava allir ríkisborgarar í danska ríkinum sostatt danskan og harvið felags heimarætt, uttan mun til hvar teir eru heimahoyrandi í danska ríkinum.

Sambært heimastýrislógini § 10 verður ein føroyingur roknaður sum ein, ið hevur danskan heimarætt og er heimahoyrandi í Føroyum.

Øvugtdømi av hesum hevur so við sær, at persónur, ið ikki er heimahoyrandi í Føroyum, ikki er føroyingur.

b) Rættindi og skyldur

Danskur ríkisborgari hevur í dag somu rættindi og



Uppritið almannakunngjørt

skyldur, sum aðrir danskir ríkisborgarar, ið búgva í sama "landi" í danska ríkinum.

Sum dømi um hetta kann nevnast, at føroyingar ið flyta til Danmarkar fáa valrætt, verða valbær, og kunnu ogna sær fasta ogn har, og koma annars undir somu reglur, eitt nú skattareglur, sum tey ið búgva har.

Tað sama ger seg galdandi fyri danir, ið flyta til Føroya.

Somuleiðis hava føroyingar, ið flyta til Danmarkar, rætt til at arbeiða har uttan serligt arbeiðsloyvi, og koma teir tá annars undir somu reglur sum tey ið búgva í Danmark. Tað sama ger seg galdandi fyri danir, ið flyta til Føroya.

Føroyingar, ið flyta til Danmarkar kunnu útbúgva seg og hava rætt til stuðul sambært galdandi donsku stuðulsskipanum. Tað sama ger seg galdandi fyri danir, ið flyta til Føroya.

Eisini hava føroyingar, ið flyta til Danmarkar rætt til heilsuveitingar og almannaveitingar í Danmark, eftir somu reglum sum eru galdandi fyri tey ið búgva har. Tað sama ger seg galdandi fyri danir, ið flyta til Føroyar.

At danskir ríkisborgarar, sum búgva í sama "landi" í danska ríkinum, hava somu rættindi og skyldur, er tó ikki ein forðing fyri at tað t. d. í løgtingslóg verður ásett, at danskir ríkisborgari skal vera heimahoyrandi í Føroyum, og sostatt verða føroyingur sambært heimastýrislógini, fyri at fáa ávís rættindi í Føroyum.

At ríkisborgarar í danska ríkinum hava felags ríkisborgararætt merkir tó ikki treytaleyst at teir eisini hava felags skyldur hvør hjá øðrum.

Sum dømi um hetta kann nevnast, at ungir føroyskir menn, ið fyribils hava tilhald í Danmark, eru undantiknir verjuskyldu.[4]

Hvat viðvíkur skyldunum hjá dønum í Føroyum kann vísast á regluna í grein 11 í heimastýrislógini, har tað er er ásett, at danskt kann eins væl og føroyskt nýtast í almennum viðurskiftum. Hetta merkir t.d. at ein dani ikki nýtist at duga føroyskt fyri at samskifta við almennu føroysku umsitingina.

Harumframt kann verða víst til grein 10 í heimastýrislógini, har heimastýrið kann áseta reglur um, at valrættur og valføri til stovnar, sum hoyra undir føroyska heimastýrið, kunnu verða treytað av at avvarðandi er føroyingur. Hendan heimildin er tó ikki brúkt.

At ríkisborgarar í danska ríkinum hava felags heimarætt merkir heldur ikki treytaleyst at teir hava felags rættindi og skyldur mótvegis triðjulondum.

Sum dømi um hetta kann nevnast, at tey rættindi, ið t. d. eru ásett í ES sáttmálanum um frítt at fara hjá arbeiðskraftini í ES, ikki eru galdandi fyri føroyingar.

Hetta merkir, at ein persónur sum hevur tilhald í Føroyum við passi har "Føroyingur" og "Føroyar" eru sett aftaná "Dansk" og "Danmark" er at líkastilla við ein triðja lands borgara í ES høpi.

Hinvegin kemur persónur, ið hevur umrødda pass, og sum hevur tilhald í Danmark, undir reglurnar í ES sáttmálanum. [5]

Nýggj skipan viðvíkjandi rættindum og skyldum føroyinga og dana hvør hjá øðrum

**Serstakur heimarættur.**

Nýggja skipanin merkir, at felags heimarætturin verður settur úr gildi, og at serstakur føroyskur heimarættur kemur í staðin.

Nýggja skipanin krevur, at serstøk føroysk lóg um føroyskan heimarætt verður gjørd. Harumframt verður neyðugt at gera eina útlendingalóg, og at gera eina skipan fyri umsitingina av økinum, ið skal virka tann dag tá ið sáttmálin millum Føroyar og Danmark kemur í gildi.

Í Íslandi varð íslendskur heimarættur ikki endaliga staðfestur fyrr enn aftaná at sáttmálin kom í gildi í 1918. Hetta hevði við sær nógvar umsitingarligar og løgfrøðiligar trupulleikar.

Fyri at avmarka sovorðnar trupulleikar verður mælt til, at lóg um føroyskan heimarætt kemur í gildi samstundis sum sáttmálin.

**Rættindi og skyldur**

Ynski hjá samgonguni er, at føroyingar í mest møguligan mun skulu varðveita tey rættindi ið føroyingar, sum danskir ríkisborgarar hava í Danmark í dag, og at danir fáa somu rættindi í Føroyum, sum føroyingar fáa í Danmark. Undantøkini frá hesum er tó herskylda, valrættur og valbæri og starvsetanir í almennu fyrisitingini.

Hetta merkir fyrst og fremst, at danir, ið flyta til Føroya, ella føroyingar ið flyta til Danmarkar kunnu arbeiða og búseta seg hvør hjá øðrum og verða teir javnsettir við tey, ið hava heimarætt í tí landinum, tey búseta seg í.

Somuleiðis merkir hetta, at hesi hava rætt til útbúgving og útbúgvingarstuðul, heilsuveitingar, og almannaveitingar eftir somu reglum sum tey, ið hava heimarætt í tí landinum, tey búseta seg í.

Tað er sannlíkt at danir vilja tryggja sær, at teir kenna reglurnar um hvør ið kann fáa føroyskan heimarætt, áðrenn teir kunnu ganga ynskinum um felags rættindi og skyldur á møti. Við hesum vilja teir tryggja seg ímóti einari bakhurð til ágóðar í danska samfelagnum, sum útlendingar, ið hava fingið føroyskan heimarætt, kunnu nýta.

Skotið verður tí upp, at



reglurnar um hvør kann fáa føroyskan heimarætt fylgja teimum donsku, við teimum undantøkum, ið natturliga standast av nýggju skipanini.

Viðmerkingar til meginreglu 8

**Kongsfelagsskapur**

Galdandi skipan viðvíkjandi kongsfelagsskapi

Føroyar eru undir sama kongi sum Danmark og Grønland. Ráðandi fatanin hesum viðvíkjandi tykist vera, at kongurin (nú drotningin) av Danmark eisini er kongur Føroya og Grønlands, tí hesi lond vera mett sum partar av danska ríkinum. Vísast kann á, at ein onnur fatan hesum viðvíkjandi er framkomin í nýggjari bók eftir Zakarias Wang. Sambært ZW eru Føroyar (og Grønland) undir egnum kongi, ið tó samstundis er kongur Danmarkar — t.e. ein kongur yvir tveimum ríkjum. Í Hvítubók (útkom í sep. 1999) verður greitt frá, at Føroyar fyrst komu undir valdið hjá norskum kongum, seinni donskum, men altíð sum serstakt land við serligari rættarstøðu. Meira verður ikki gjørt burturúr hesum spurningi her.

Sambært verandi donsku rættarstøðu kongs, verður Føroyska heimastýrið ikki beinleiðis ávirkað av kongsvaldinum, við tað, at vald og skyldur kongs sambært donsku grundlógini bert viðvíkja ríkisins myndugleikum — ríkisstjórnini og fólkatinginum.

**Nýggj skipan viðvíkjandi kongsfelagsskapi**

Ásett verður í altjóðarættarligum sáttmála millum Føroya og Danmarkar, at *Kongur Danmarkar eisini er Kongur Føroya*. Sostatt kann verða sagt, at verandi kongsfelagsskapur heldur fram, men tó á nýskipaðum grundarlagi, nevniliga sambært hesum altjóðarættarliga sáttmála.

Í sáttmálanum kann verða ásett, at Føroyar binda seg til at góðtaka tann sum Føroya kong ella drotning, ið danir til eina og hvørja tíð sambært egnu stjórnarskipan teirra taka til kong/drotning.

Tað er óivað best, at kongur, ið hevur sín bústað í Keypmannahavn, hevur ein umboðsmann í Føroyum. Í (bretskum) *Commonwealth*-høpi bera slíkir umboðsmenn hjá drotningini heitið *Governor General*, og teir eru aloftast innbornir í tí landi, har teir eru umboðsmenn. Tað verður mett at vera týdningarmikið, sæð frá einum føroyskum sjónarhorni, at ein slíkur umboðsmaður verður føroyingur, eins og vanligt er í *Commonwealth*-høpi. Hesin umboðsmaður røkir skyldur kongs hansara vegna í Føroyum. Hereftir verður leiklutur kongs í Føroyum einans umboðandi, og at vera ein ímynd av tí søguliga og mentanarliga felagsskapinum landanna millum. Annar spurningur er at geva slíkum umboðsmanni eitt hóskandi føroyskt heiti.

Tørvur er ikki á at hava ítøkiligar politiskar uppgávur til kongsvaldið í Føroyum, so sum t.d. í Danmark, har kongur staðfestir lógir og hevur ein leiklut, tá stjórnarskifti eru. Í Føroyum kann verða hildið fast við, at hesar uppgávur liggja hjá ávikavist løgmanni og tingformanni, til ein føroysk stjórnarskipan møguliga ásetur annað.

**Dentur verður lagdur á, at fremsta endamálið við slíkum kongsfelagsskapi er at varðveita eina sterka *ímynd* av felagsskapinum — søguliga og mentanarliga — Danmarkar og Føroya millum.**

Í uttanlandsnevnd løgtingsins er landsstýrið sinnað at gera sítt ítarsta til at finna eina breiða semju innan fyri karmin av omanfyri nevndu meginreglum. Í hesum sambandi eigur eisini at verða havt í huga royndir landsstýrisins higartil at gera semju við andstøðuflokkar um hetta sera týdningarmikla mál fyri Føroyar.

Við nevndu stevnumiðum sum máli hevur landsstýrið avgjørt at boða donsku ríkisstjórnini til samráðingar í vár, soleiðis at sáttmálagerð og staðfesting av sáttmála, heruppií fólkaatkvøða í Føroyum, kunnu verða lokin í ár.

Í Tinganesi á pálsmessu ár 2000

*1 Tilvísing: Folketinget. Svar på spørgsmål stillet af Frank Dahlgaard (KF) til økonomiminister Marianne Jelved. Spm. nr. S 1857, 21/4 99 og Svar (3/5 99)*

*2 Ella EU, um Danmark fult út verður við í evrusamstarvinum.*

*3 Trísiffrað tøl í klombru vísa til síðutøl í Hvítubók, Fylgibindi 2.*

*4 Sambært skrivi frá Innanríkismálaráðnum dagfest tann 15. juli 1996 . (Landsstýrisins j. nr 75-7/96.)*

*"Efter værnepligtsloven er færøske og grønlandske mænd værnepligtige ligesom andre danske statsborgere. De får dog først pligt til at møde for session, når de tager ophold i denne del af riget, jf. værnepligtslovens §§ 1, 5 og 13.*
*Siden 1963 har man imidlertid haft en praksis, hvorefter unge mænd, hvis afstamning hører til den færøske eller grønlandske befolkning, og som oplyser at opholde sig midlertidigt i Danmark går fri for sessionsbehandling.*
*Denne praksis er fastlagt ved en regeringsbeslutning, som bygger på en forudsætning om, at der ikke føres kontrol med, om de pågældendes ophold hernede reelt er permanent eller midlertidigt."*

*5 Sambært skrivi frá Løgmálaráðharranum dagfest tann 7. apríl 1999. ( Landsstýrisins j.nr. 516-1/92).*

*"På den baggrund er det Justitsministeriets opfattelse, at personer, der har bopæl på Færøerne — hvad enten de har haft bopæl på Færøerne gennem længere eller kortere tid — vil være afskåret fra at påberåbe sig reglerne om arbejdskraftens frie bevægelighed, jf. EF-traktaten art. 48, etableringsretten, jf. art. 52, og fri udveksling af tjenesteydelser, jf. art. 59. Omvendt vil danske statsborgere, der har haft bopæl på Færøerne, når de er flyttet til Danmark og har fået fast bopæl der, kunne påberåbe sig de nævnte bestemmelser i EF-traktaten.*

*Jeg må dog tilføje, at det ikke helt kan udelukkes, at omgåelsesbetragtninger kan føre til, at personer, der er flyttet fra Færøerne til Danmark, for umiddelbart derefter at indrejse i et andet EU-land under påberåbelse af EF-traktatens regler om fri bevægelighed, ikke skal anses for danske statsborgere i EF-traktatens forstand.*

*Da spørgsmålet om færingers mulighed for at påberåbe sig EF-traktatens regler om bl.a. arbejdskraftens frie bevægelighed efter Justitsministeriets opfattelse bør afgøres ud fra de ovenfor nævnte kriterier, kan det herefter ikke gøre nogen forskel, om vedkommende er i besiddelse af et pas, der er udfærdiget på en særlig færøsk blanket, eller et pas, der er udfærdiget på en sædvanlig blanket, jf. § 17, stk. 2, i pascirkulæret."*